## Soltið føroyskt vikuskifti

Tað gongur stak væl hjá AaB, men tað gongur einki serligt hjá teimum báðu føroysku landsliðsspælarunum, sum eru á lønarlistanum í felagnum í Aalborg. Mikukvøldið varð AaB varpað úr steypakappingini eftir brotssparkskapping í Vejle. Ta ferðina vóru bæði Jón Rói Jacobsen og Súni Olsen á AaB liðnum. Í gjár var hvørgin føroyingurin í ferðalagnum til Randers. Næstbesta AaB liðið hevði leygadagin vitjan av Thisted, sum er oddalið í 2. deild vestur. AaB, sum undan 14. umfari var á triðja plássi, tapti 2-0.



## Kvinnurnar vunnu á Estlandi

Føroyska kvinnulandsliðið í fótbólti vann sunnumorgunin ímóti Estlandi í altjóða kapping í Litava. Føroyar vóru betra liðið í dystinum og vunnu uppiborið 2-1. Hetta var eisini støðan í hálvleikinum. Jacoba Langgard skoraði við beinleiðis frísparki, og hitt føroyska málið var eitt sjálvmál. Føroyski málverjin Randi Wardum bjargaði brotssparki, og Føroyar fingu tvey mál kolldømd. Føroyar taptu fyrsta dystin í kappingini ímóti Litava, og mikudagin verður seinasti dysturin spældur - hann er ímóti Letlandi.

# Oddabrakið endaði við javnleiki

**Arsenal fingu javnað til 2-2, heldur dramatiskt í tíðini, ið dómarin hevði lagt afturat. Málið skoraði William Gallas, ið hevði verið so óheppin, beint fyri hálvleik, at beina bóltin í egið net. So skaðin varð gjørdur góður aftur, við útjavnandi málinum. Hetta er 25. ferðin á rað, at Arsenal fer av vøllinum ósigraðir**



*William Gallas hevur júst sent bóltin móti málinum hjá Manchester. Van der Saar fekk hondina á, men bólturin hevði longu verið innan fyri málstrikuna*

**FÓTBÓLTUR**
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Málið hjá Cristiano Ronaldo, til 1-2, tá átta minuttir írestaðu, tóktist at hava avgjørt oddabrakið, til fyrimuns fyri meistararnar úr Manchester, samstundis sum tað hevði endað røðini av dystum, ið Arsenal hava verið ósigraðir (24. dystin á rað blaðm.). Men so skuldi ikki vera, tí franski William Gallas fekk javnað í yvirtíðini, til endaliga úrslitið 2-2.

### Dystargongdin

Arsenal løgdu væl fyri og fingu sítt eyðmerkta skjóta avleveringsspæl at flóta sera vakurt, beinanvegin. Manchester løgdu seg í verjustøðu og taklingarnar flugu sum kaldar vetraródnir, og steðgaðu The Gunners. Tá ein løta var farin, og Arsenal høvdu linkað um pressið, komu United alt meira við í dystinum, og fingu so eisini lagt seg á odda stutt fyri hálvleik. Málið kom eftir at Rooney hevði roynt seg við skotið, ið rakti Gallas og sprakk innum málstrikuna til 0-1 til gestirnar.

Tað tóktist sum um at fyrsta málið rættuliga fekk Arsenal at rakna við, tí bert tríggjar minuttir inn í seinna hálvleik, fingu teir javnað. Málið kom eftir at Adebayor hevði skotið, ið Van der Saar bjargaði, men bólturin stakk til Bacary Sagna, ið legði bóltin fyri føturnar á Fabregas, ið lættliga kundi skorað sítt 11. mál í hesum kappingarárinum.

Málið tóktist nerva United, tí Arsenal pressið øktist, eins og í byrjanini á dystinum, men seint og sikkurt komu United inn í dystin aftur, og Evra kundi eftir gott og væl 82 minuttir, leggja bóltin fyri føturnar á Cristiano Ronaldo, ið legði United á odda 1-2.

Arsenal pressaði alt hvat teir megnaðu móti endanum fyri at javna, og í yvirtíðini, kundi syndarin í 0-1 málinum frá fyrsta hálvleiki, William Gallas, javna til 2-2, eftir at Van der Saar hevði roynt at skumpað bóltin útum. Men b´lturin hevði verið væl innanfyri, og tískil vórðu stigini býtt millum liðini.

### Hinir dystirnar

Aðrastaðni, hetta vikuskiftið, vórðu átta dystir spældir. Millum annað vann Chelsea 2-0 á útivølli móti Wigan, Liverpool fekk bert málleysan javnleik móti Blackburn, og Portsmouth vann knúsandi sigur móti Newcastle á útivølli, úrslitið gjørdist 1-4.

Í kvøld kl 20, spæla Man Ctiy seinasta dystin í hesum umfarinum, tað verður móti liðnum hjá Roy Keane, Sunderland.

**Sunset-kappingin**

| | | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | dystir | v | - | j | - | t | mál | mál | munur | stig |
| 1 | Stjørnan | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 157 | 117 | 40 | 8 |
| 2 | VB | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 80 | 77 | 3 | 5 |
| 3 | Neistin | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 78 | 61 | 17 | 4 |
| 4 | StÍF | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 85 | 94 | -9 | 3 |
| 5 | Kyndil | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 109 | 132 | -23 | 3 |
| 6 | VÍF | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 100 | 128 | -28 | 3 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | | | | | | vunnin | tapt | mál- | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **dystir** | **v** | **-** | **j** | **-** | **t** | **mál** | **mál** | **munur** | **stig** |
| 1 | Neistin | 4 | 4 | - | 0 | - | 0 | 118 | 97 | 21 | 8 |
| 2 | StÍF | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 118 | 88 | 30 | 6 |
| 3 | Kyndil | 5 | 3 | - | 0 | - | 2 | 119 | 135 | -16 | 6 |
| 4 | H71 | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 132 | 133 | -1 | 4 |
| 5 | VÍF | 5 | 2 | - | 0 | - | 3 | 132 | 141 | -9 | 4 |
| 6 | **KÍF** | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 117 | 142 | -25 | 0 |

## FAKTA

| | | |
|---|---|---|
| Arsenal – Man Utd | 2-2 | (Fabregas, Gallas – s.m., Ronaldo) |
| Aston Villa – Derby | 2-0 | (Laursen, Young) |
| Blackburn – Liverpool | 0-0 | (Ongi mál) |
| Everton – Birmingham | 3-1 | (Yakubu, Vaughan, Carsley - Kapo) |
| Fulham – Reading | 3-1 | (Davies, Dempsey, Healy - Doyle) |
| Man City – Sunderland | | (Verður) |
| Middlesbrough – Tottenham | 1-1 | (Young – D.Bent) |
| Newcastle – Portsmouth | 1-4 | (s.m. – Pamarot, Benjani, Utaka, Kranjcar) |
| West Ham – Bolton | 1-1 | (McCartney - Nolan) |
| Wigan – Chelsea | 0-2 | (Lampard, Belletti) |